# Hvør fjøl á flot leygardagin

**Leygardagin verður fiskikapping í Norðoyggjum. Tað er stuðulsfelagið hjá skúlaskipinum Draganum, sum skipar fyri. Í vikuskiftinum er rættiliga góð streymloysa, so er bara at vóna, at veðrið eisini verður til vildar**

FISKIKAPPING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Spennandi verður at vita, hvørji verða fiskikongar í Norðoyggjum í ár. Í fjør vóru tað brøðurnir, Marne og Sólarn Isaksen úr Klaksvík, sum vóru bestir. Steyp verður eisini latið honum ella henni, sum fær størsta fiskin. Henda myndin er frá kappingini fyrraárið, tá Høgni Hansen vann*

Nú er at rigga til hjá norðingum, tí leygardagin verður árliga fiskikappingin, sum stuðulsfelagið hjá skúlaskipinum, Draganum, skipar fyri.

Ein hópur av bátum liggur við bátabrúgvarnar í Klaksvík og á Borðoyavík, umframt allar teir, ið finnast norðanfyri fjall. Og fert tú framvið bátastøðunum, sært tú nærum altíð menn, sum práta um veður og vind, útróður og fiskireiðskap.

Hetta er ein partur av okkara mentan, sum heldur lívið í mongum manni - og kvinnum við.

Fiskikapping hevur verið hildin í mong ár, og er tað ein øðrvísi og hugnaligur dagur hjá monnum. Spennandi verður, hvørjum eydnast at verða fiskikongar í ár.

### Kappingartreytir

Klokkan 7.30 leygarmorgunin verða luttøkusjøl til fiskikappingina at fáa umborð á Draganum, sum liggur á Klaksvík. Bátar av Klaksvík, Borðoyavík og Árnafirði fáa luttøkuskjøl har. Bátar av Viðareiði fáa luttøkuskjøl á Eiðsvík, og teir ella tey, sum fara úr Hvannasundi, skulu heinta skjølini við Frostvirkið ella Norðfra, sum virkið eitur í dag.

Av trygdarávum er ikki loyvt at fara einsamallur; tað skulu tí minst tveir mans við hvørjum báti. Bátarnir kunnu loysa klokkan 8, og tað er bert loyvt at nýta snøri, snellu ella tráðu til fiskireiðskap.

Tað er ikki loyvt at fiska við aliringarnar, og seiður telur ikki við í vektini.

### Steyp og uppboðssøla

Fiskurin verður lagdur upp við bátabrúgvarnar við Nólsoyar Pállsgøtu, og millum klokkan 18 og 19 verður uppboðssøla, har fólk hava møguleika at keypa sær at kóka.

Tey, ið hava luttikið í fiskikappingini, fáa kaffi og pannikøkur umborð á Draganum.

Tann bátur, sum hevur størstu veiðu fyri hvønn mannin verður vinnari, og fáa tey ferðasteyp til ognar. Manningarnar á trimum teimum bestu bátunum fáa steyp til ognar. Eisini verður steyp latið honum ella henni, sum fær størsta fiskin.

Í fjør varð báturin, Benjamin, við brøðrunum, Marna og Sólarn Isaksen, bestur. Veiðan hjá teimum vá 434 pund. Næstbetur var, Hemarin, við Steyni Andreasen og Bergur Mikladal. Nummar trý var, Neshamar, við Elmar Simonsen og Tróndi Sivertsen.

Tað er Norðoya Sparikassi, sum letur steypini.

### Fiskikappingardansur

Um kvøldið verður skipað fyri fiskikappingardansi í Skálanum. Contry bólkurin fer at spæla til dansin, sum byrjar klokkan 23.

Peningurin, sum kemur inn við fiskikappingini og dansinum, fer óskerdur til skúlaskipið, Dragan.



*Tað er stuðulsfelagið hjá skúlaksipinum, Dragin, sum stendur fyri fiskikappingini og dansinum í Skálanum. Peningurin fer óskerdur til skipið*















LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Handverkari

Søkt verður eftir dugnaligum og álitandi handverkara (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinusmiður, maskinsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Føroya Handverksmeistarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda Landsverkfrøðinginum, Postsmoga 78, 110 Tórshavn og skulu vera skrivstovuni í hendi seinasta lagi 01. oktober 2003. Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 422420 og tosa við Jóan Petur Patursson, leiðara av maskindeildini ella Niels Juul Kristiansen, smiðjuformann.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3653
**Navn:** Sp/f JSP
**Adressa:** 627 Lambi.
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 11.09.2003
**Viðtøkudato:** 11.09.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 50.000,00 til kurs 100 og kr. 30.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Sjúrður Finnsson, 627 Lambi og Jákup Petur Gaardlykke, 627 Lambi.
**Stjórn:** Sjúrður Finnsson, 627 Lambi og Jákup Petur Gaardlykke, 627 Lambi.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 11.09.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka smiðjuvirki, handverk, ídnað, handil og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 16. september 2003*

*Kristin Balle*

## Starvsfólk til Frukt- og grønmetisdeildina og blómudeildina

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- eina deild í framhaldandi vøkstri og alla tíðina við nýggjum avbjóðingum og broytingum
- eitt gott og lívligt arbeiðsumhvørvi
- góða løn eftir avtalu og førleika.

**Vit vænta okkum av tær:**
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt við fjølbroyttum hugflogi
- at tú kanst arbeiða bæði innan- og uttandura
- at tú framhaldandi kanst skapa eina spennandi, tiltalandi, nøktandi og kundavinarliga deild, sum í dag hevur sera gott orð á sær.

**… Og meira um bæði størvini:**
**Setan:** Skjótast gjørligt eftir avtalu.
**Løn:** Sambært avtalu.
Meira fæst at vita um størvini við at støkka inn á gólvið ella ringja á tlf. 311320 ella 217593 og fáa eitt prát við leiðaran **Bo Møller.**

Skrivlig umsókn saman vð viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi innan 24. sept. 2003.

**FK-Tórshavn**
Att.: Bo Møller
Dr. Jakobsensgøta 6
Boks 349
110 Tórshavn

**KEYPSSAMTØKAN DR. JAKBOSENSGØTA**

LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Service-maður

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi servicemanni (m/k) til maskinmiðstøðina í Kollafirði.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um eftirlit við entreprenørmaskinum hjá Landsverkfrøðinginum, sum eru í arbeiði kring landið og umvæla møgulig smábrek á hesar. Service-maðurin skal eisini umvæla maskinur o.a. á verkstaðnum á maskinmiðstøðini.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinusmiður, maskinsmiður, lastbilasmiður, ella aðra viðkomandi útbúgving og má hava – ella skal taka – stóra koyrikortið fyri at kunna koyra service-bilin.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært avvarðandi yrkissáttmála ella sambært avtalu. Roknast kann við nakað av yvirtíð.

**Umsóknir**
Umsóknir vera at senda **Landsverkfrøðinginum Postsmoga 78, 110 Tórshavn** og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 01. oktober 2003. Merkið brævbjálvan »Umsókn servicemaður«. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 422420 og tosa við Jóan Petur Patursson, leiðara av maskindeildini ella Bo Nielsen, service-formann.

## Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 17. september 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Laksavirkið hjá P/F Fiskavirkið í Fuglafirði**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo .

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**







## Lærlingur søkist

Lærlingur søkist til Safari Transport, at byrja skjótast gjørligt. Arbeiðið umfatar bæði skrivstovuarbeiði og vørukoyring.

Tú skal vera fyrikomandi og hava hug at arbeiða.

Lærutíðin er 2 til 3 ár, alt eftir hvørja útbúgving, tú hevur áðrenn. Løn sambært avtalu.

Tú verður útbúgvin skrivstovufólk innan Speditión og Shipping.

Safari Transport arbeiðir við flutningi av flog- og sjófrakt, tollavgreiðslu og at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. september.

Hava tit spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, vinarliga ring til okkum.

SAFARI TRANSPORT
Eystara Bryggja · FO-110 Tórshavn
Tlf. 322222 · Fax 313222
E-mail: safari@safari.fo
web: www.safari.fo